# Kanning av Jøkulfell kroyst ígjøgnum

**– Bara hesin eini fyrispurningurin prógvar, at fólkaræðið verður styrkt við teimum munnligu fyrispurningum í løgtinginum, sigur Torbjørn Jacobsen, løgtingsmaður. Avleiðingin av hansara munnliga fyrispurningi um føroyska leiklutin í bjargingararbeinum, tá ið Jøkulfell gekk burtur, var ein óheft kanning, sum fleiri løgtingsmenn vóru við til at kroysta ígjøgnum**

AVLEIÐINGAR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað eydnaðist løgtingsmonnum úr fleiri flokkum at noyða eina kanning ígjøgnum av føroysku tilbúgvingini í sambandi við vanlukkuna, tá ið Jøkulfell sakk norðanfyri Føroyar.

Eftir ein munnligan fyrispurning og hart kjak í løgtinginum mikudagin, boðaði landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum hósdagin frá, at ein kanning verður gjørd av tilburðinum.

– Álitið á føroysku tilbúgvingarskipanina hevur alstóran týdning, og tí er avgerandi neyðugt at allir upplýsingar í hesum málinum koma fram og verða viðgjørdar í samlaðum høpi, segði Bjørn Kalsø hósdagin sum grundgeving fyri, at kanningin nú verður gjørd.

Tað er Norsk Veritas, sum skal standa fyri kanningini, og ein avleiðing er, at stjórin fyri MRCC Tórshavn, Djóni Weihe, verður koyrdur frá, meðan kanningin fer fram.

Landsstýrismaðurin hevur tilnevnt Jóhan Jacob Jakobsen, vaktgangandi yvirmann, sum fyribilsleiðara á Sjóbjargingarstøðini.

### Styrkir fólkaræðið

Málið byrjaði við einum munnligum fyrispurningi frá Torbjørn Jacobsen, løgtingsmanni. Hann vildi hava at vita frá landsstýrismanninum við fiskivinnumálum, hví føroyska sjóbjargingartyrlan ikki beinanvegin varð send at hjálpa manningini umborð á Jøkulfell, tá ið farmaskipið sendi út neyðarkall.

Endin var eitt rúkandi heitt politiskt mál, sum nú fyribils endar við, at landsstýrismaðurin hevur sett í verk eina óhefta kanning av tilburðinum.

– Bara hesin eini fyrispurningurin prógvar, at fólkaræðið verður styrkt við teimum munnligu fyrispurningum í løgtinginum.

Onkur hevur funnist at, at landsstýrismenninir verða ov nógv órógvaðir av slíkum fyrispurningum, men eg haldi, at hetta er styrki fyri demokratiið, sigur Torbjørn Jacobsen.

– Hetta er einasti opni vegurin millum mannin á gøtuni og ministaran, tí nógvar av hesum fyrispurningum koma av, at løgtingsmenn tosa við vanlig fólk um ymsar trupulleikar og ymisk mál.

### Nøgdur við kanning

Torbjørn Jacobsen sigur, at hann er nøgdur við, at ein kanning nú verður gjørd av føroysku tilbúgvingini í sambandi við vanlukkuna við Jøkulfell.

– Einasta endamálið hjá mær við hesum fyrispurninginum var at fáa at vita, um føroyska tilbúgvingin virkar nóg væl. Hetta var á ongan hátt eitt politiskt álop á landsstýrismannin. Eg eri nøgdur við, at ein kanning nú verður gjørd, tí okkara partur av tilbúgvingini á sjónum skal vera í ordan, sigur løgtingsmaðurin fyri Tjóðveldisflokkin.

# Sjóbjargingarstøðin var væl fyrireikað

**– Fyrireikingararbeiðið til Sjóbjargingarstøðina var avgjørt gott. Vit høvdu útlendskar konsulentar til at venja starvsfólkini, og tá ið støðin fór at virka, hevði hon fingið toppkarakter frá konsulentunum, sigur Jørgen Niclasen, sum var landsstýrismaður, tá ið føroyska Sjóbjargingarstøðin fór at virka**

SJÓBJARGING

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*




*– At døma eftir teimum upplýsingum, sum higartil eru komnar fram, tykist tað, sum at Sjóbjargingarstøðin hevur verið ov sein at reagera upp á eitt neyðarkall, men spurningurin er, um tað eru upplýsingar, sum ikki eru komnar fram enn, sum kunnu broyta hesa fatan. Tí haldi eg, at ein kanning av tilburðinum er neyðug, sigur Jørgen Niclasen, fyrrverandi landsstýrismaður við fiskivinnumálum*

Tað var eingin slingur í valsinum, tá ið føroyska Sjóbjargingarstøðin, MRCC-Tórshavn, var fyrireikað.

Tað heldur Jørgen Niclasen, sum var landsstýrismaður við fiskivinnumálum, tá ið Sjóbjargingarstøðin gjørdist veruleiki, og føroyingar tóku við ábyrgdini av tilbúgvingini á sjónum.

– Fyrireikingararbeiðið til Sjóbjargingarstøðina var avgjørt gott. Vit høvdu útlendskar konsulentar til at venja starvsfólkini, og tá ið støðin fór at virka, hevði hon fingið toppkarakter frá konsulentunum, sigur Jørgen Niclasen.

### Vildu tryggja seg

Tað var síðst í 2000, at Fiskamálaráðið rættiliga setti gongd í fyrireikingararbeiðið til eina føroyska tilbúging. Kaj P. Mortensen, sum tá var aðalstjóri, stóð fyri arbeiðnum, men fleiri onnur starvsfólk og uttanhýsis konsulentar vóru við í arbeiðnum.

Millum teirra var bretska fyritøkan Link Associated.

– Vit fingu útlendskar konsulentar til at venja starvsfólkini, og teir gjørdu nógvar venjingar við teimum. Í fyrstuni gekk tað einki serligt, men venjingarnar eydnaðust betri og betri, og tá tær vóru lidnar, vóru konsulentarnir væl nøgdir við starvsfólkið á Sjóbjargingarstøðini, sigur Jørgen Niclasen.

– Vit vildu í fyrireikingunum tryggja okkum, at vit fingu eina væl virkandi føroyska Sjóbjargingarstøð. Endamálið var at fáa eina betri tænastu og størri trygd í føroyskum sjóøki.

Í apríl mánaði 2002 fór MRCC-Tórshavn at virka, og stutt frammanundan var seinasta venjingina, har ein pólskur trolari kom í havsneyð í Nólsoyarfirði. Hesari venjingini fylgdu bretskir serfrøðingar, og teir vóru nøgdir við arbeiðið hjá Sjóbjargingarstøðini.

### Tekur undir við kanning

Jørgen Niclasen tekur undir við, at ein kanning nú verður gjørd av Sjóbjargingarstøðini, eftir at tyngjandi upplýsingar eru komnar fram um bjargingina í sambandi við, at farmaskipið Jøkulfell gekk burtur norðanfyri Føroyar og seks mans sjólótust.

– At døma eftir teimum upplýsingum, sum higartil eru komnar fram, tykist tað, sum at Sjóbjargingarstøðin hevur verið ov sein at reagera upp á eitt neyðarkall, men spurningurin er, um tað eru upplýsingar, sum ikki eru komnar fram enn, sum kunnu broyta hesa fatan.

– Tí haldi eg, at ein kanning av tilburðinum er neyðug. Tað er neyðugt fyri alt ið, sum vit skulu hava á Sjóbjargingarstøðina, sigur Jørgen Niclasen.

### Kløkkir í løgtinginum

Fyrrverandi landsstýrismaðurin sigur, at tað koma fullkomiliga óvart á flestu løgtingsmenninar, at tað vóru so stór ivamál um føroysku tilbúgvingina, tá ið Jøkulfell gekk burtur.

– Vit vistu einki um hetta, fyri enn málið kom fram í løgtinginum, og tí haldi eg, at nógvir tingmenn blivu kløkkir av hesum, og tí reageraðu teir. Spurningurin er so, hví ikki landsstýrismaðurin, sum hevur vitað um eftirmetingina, ikki hevur gjørt nakað við hetta fyrr enn nú, sigur Jørgen Niclasen.

– Tað er menniskjaligt at gera mistøk, og um onkur mistøk eru gjørd í hesum førum, so verða tey ikki gjørd aftur. MRCC hevur eisini longu tikið avleiðingarnar av eini eftirmeting, og tískil eiga vit at hava álit á Sjóbjargingarstøðini. Men ein kanning kann fáa allar upplýsingar fram og staðfesta, hvat tað var, sum fór fram, og tí er ein kanning neyðug, heldur hann.